Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 17

ISSN 0907-905X

Nr. 44 17. mai 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**ávís tiltøk samsvarandi stovningarsáttmála Sameindu Tjóða**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunngerløgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum kann í kunngerð áseta verjutiltøk móti likamligum ella løgfrøðiligum persónum ella bólkum, ið eru knýttir at yvirgangsvirksemi, sambært samtykt 1267 (1999), við seinni og komandi broytingum, og samtykt 1373 (2001), ið trygdarráð Sameindu Tjóða hevur viðtikið við støði í kapitli VII í tess stovningarsáttmála.

**§ 2.** Danskir ríkisborgarar við bústaði í Føroyum og løgfrøðiligir persónar, sum eru skrásettir og innlimaðir eftir føroyskari lóg, hvørs fæ ella aðrar ognir beinleiðis ella óbeinleiðis tilhoyrandi teimum, sum eru fevnd av verjutiltøkunum í samtykt 1267 (1999) við seinni og komandi broytingum, ella samtykt 1373 (2001), kunnu, um hesir meta seg vera fyri órætti, senda eina skrivliga klagu til Uttanríkisráðið.

*Stk. 2.* Um skrivlig klaga verður móttikin, sambært stk. 1, skal Uttanríkisráðið gera avvarðandi persón varugan við, hvørji ráð eru tøk, og annars viðgera málið, og um neyðugt taka hóskandi stig til, at málið kann fáa skjóta viðgerð hjá umboðsmanninum, sum við støði í samtykt 1904 hjá trygdarráð Sameindu Tjóða hevur til uppgávu m.a. at viðgera møguligar klagur frá likamligum ella løgfrøðiligum persónum, ið eru skrásettir á 1267 ella 1373 listanum, hjálpa í tann mun, til ber, at klagan fær eina skjóta og nøktandi viðgerð í Al Qaida og Taliban Nevndini.

**§ 3.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juni 2011.

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 128/2010

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 99 frá 29. desember 1998 verður hendan broyting gjørd:

1) § 12, stk. 2 verður orðað soleiðis:

„*Stk. 2.* Avgjald av vinningi av spæli í Føroyum, har loyvi er givið við heimild í løgtingslóg um ítróttavedding, verður roknað eftir reglunum í løgtingslóg um ítróttavedding.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon kunngjørd.

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 166/2010

## Løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 19 verður orðað soleiðis:
„**§ 19.** Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði, ávíst av arbeiðsávísingini, missir rættin til arbeiðsloysisstuðul, sbr. tó pkt. 2. Fyrstu ferð tann arbeiðsleysi noktar, sum nevnt í pkt 1, missir hann rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, aðru ferð í 8 vikur, triðju ferð í 12 vikur og fjórðu ferð í 6 mánaðir at rokna frá degnum eftir, at fráboðanin um arbeiðstilboðið má roknast við at vera móttikið av tí arbeiðsleysa.
*Stk. 2.* Um stýrið tekur undir við ásetingunum, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur fyri, nær talan er um serliga orsøk o.l.“

2) Eftir § 19 verður sett:
„**§ 19 a.** Um arbeiðsleysur uttan serliga orsøk ikki møtir upp til skeiðstilboð, sum hann hevur fingið bjóðað frá Arbeiðsloysisskipanini og hevur tikið av, hevur viðkomandi skyldu at endurrinda arbeiðsloysisskipanini útreiðslurnar, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur havt til skeiðið. Í tann mun tað ber til, er heimilað Arbeiðsloysisskipanini at mótrokna hesar útreiðslur í arbeiðsloysisstuðli til viðkomandi.
*Stk. 2.* Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk aðru ferð ikki møtir upp til skeiðstilboð, sum viðkomandi hevur fingið bjóðað frá Arbeiðsloysisskipanini og hevur tikið av, missir, umframt at endurrinda Arbeiðsloysisskipanini skeiðskostnaðin sambært stk. 1, rættin til arbeiðsloysisstuðul í fýra vikur at rokna frá degnum eftir, at Arbeiðsloysisskipanin fær kunnleika til, at viðkomandi ikki møtti upp.
*Stk. 3.* Um stýrið tekur undir við ásetingunum, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur fyri, nær talan er um serliga orsøk o.l.“

### § 2

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 139/2010

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsjørð**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. november 2008, verður § 6, stk. 1, 1. pkt. strikað, og í staðin verður sett: „Festari kann keypa innstøðu, sethús, fjós og aðrar bygningar við hóskandi undirlendi, sum hoyra til festið. Sethús kann hann keypa sjálvur ella saman við hjúnafelaga.“
2. og 3. pkt. verða hereftir 3. og 4. pkt.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 142/2010

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 1, nr. 1 verður orðið „rúsdrekka“ broytt til „rúsdrekka við meira enn 60 rúmprosentum av alkoholi“.

2) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Framleiðsla av rúsdrekka kann einans fara fram á góðkendum framleiðsluvirkjum. Landsstýrið fær heimild í kunngerð at áseta neyðugar treytir fyri góðkenning.“

3) Í § 3, stk. 3 verður orðið „loyvinum“ broytt til „góðkenningini“, og orðini „slíkum øli“ broytt til „rúsdrekka“.

4) Í § 6 verða orðini „øl, sum í sær hevur meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, og annað“ strikað.

5) Í § 7, stk. 2 verða orðini „øl, bryggjað í Føroyum“ broytt til „rúsdrekka, framleitt í Føroyum“.

6) Í § 8, stk. 1 verða orðini „smbr. § 3, stk. 2“ broytt til „sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi“.

7) Í § 22, stk. 1, nr. 2 verður orðið „loyvi“ broytt til „loyvi ella góðkenning“.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. oktober 2011. Tó kemur § 1, nr. 4 ikki í gildi fyrr enn 1. apríl 2012.
*Stk. 2.* Fyri at fáa góðkenning, sbrt. § 3, stk. 2 er tað ein treyt, at øl, sum hevur í sær meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, ikki verður selt ella skonkt í Føroyum fyrr enn eftir 1. apríl 2012.

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 88/2010

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í lendismálum**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í lendismálum, verða í § 1 gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 1.* Landsstýrismaðurin setur kærunevnd í lendismálum við trimum nevndarlimum. Formaðurin skal vera løgfrøðingur, hinir tveir skulu vera ávikavist byggikønur og landmálarakønur. Fyri formannin og hinar nevndarlimirnar verða valdir tiltakslimir við samsvarandi sakkunnleika. Starvstíðin hjá nevndarlimum og tiltakslimum er 4 ár. Nevndarlimur verður sitandi, til nýggjur limur er valdur.“

2) § 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* Limirnir fáa fasta mánaðarliga samsýning, tó fáa innkallaðir tiltakslimir fundarsamsamsýning eftir reglum landsins um fundarpening. Ferðaútreiðslur verða goldnar eftir reglum landsins um ferðapening.“

3) Í § 1 verður sum stk. 5 sett:
„*Stk. 5.* Nevndarformaðurin kann einsamallur taka avgerð um at játta ella sýta steðgandi virknað í kærumálum, tá slík avgerð ikki tolir at bíða. Nevndarformaðurin skal uttan drál kunna nevndina um slíka avgerð.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 144/2010

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um marknaðarføring

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 19 frá 8. mai 2008 um marknaðarføring verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður sum nýtt stk. 2 sett:
„*Stk. 2.* Marknaðarføring, sum viðvíkur búskaparligu áhugamálunum hjá brúkarunum, skal ikki kunna nýtast til týðiliga at avlaga teirra búskaparligu atferð.“

2) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* §§ 1 og 3, § 12 a, § 13, stk. 3 og 6, nr. 1 verða ikki nýttar fyri fíggjarfyritøkur.“

3) § 2, stk. 3 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* § 13, stk. 2 og 4 og §§ 15 og 16 verða ikki nýttar fyri fíggjarfyritøkur“.

4) § 3 við tilhoyrandi yvirskrift verður orðað soleiðis:
„*Villleiðandi og óhóskandi marknaðarføring*
**§ 3.** Tað er ikki loyvt at nýta skeivar upplýsingar ella leggja burturúr týðandi upplýsingar, um tær kunnu nýtast til týðiliga at avlaga búskaparligu atferðina hjá brúkarunum ella øðrum vinnurekandi á marknaðinum.
*Stk. 2.* Marknaðarføring, sum vegna innihald, form ella framferðarhátt er villleiðandi, ágangandi ella ávirkar brúkarar ella vinnurekandi á óhóskandi hátt, og sum kann nýtast til týðiliga at avlaga búskaparligu atferð teirra, er ikki loyvd.
*Stk. 3.* Upplýsingar um verulig viðurskifti skulu, um neyðugt, verða skjalprógvaðar.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur fyri marknaðarføring, sum undir øllum umstøðum verður mett at vera órímilig í brúkaraviðurskiftum.“

5) § 5, stk 3 verður sett úr gildi.

6) Aftaná § 12 verður sett:
„*Áheitan um keyp*
**§ 12 a.** Í sambandi við áheitan á brúkarar um keyp skal ein vinnurekandi lata niðanfyristandandi upplýsingar, um hesar ikki frammanundan greitt framganga av samanhanginum:
1) Sereyðkenni við vøruni ella tænastuveitingini.
2) Navn og bústaður hjá tí vinnurekandi.
3) Gjalds- og onnur avtaluviðurskifti í tann mun, hesi víkja frá tí, sum er vanligt innan vinnugreinina.
4) Framferðarhátt hjá tí vinnurekandi í sambandi við kærumálsviðgerð í tann mun, hesin víkir frá vanligari siðvenju innan vinnugreinina.
5) Aftranarrætt, avbíleggingarrætt ella aftursendingarrætt, um kundin hevur slíkan rætt.
6) Prísur íroknað avgjøld.
*Stk. 2.* Um vøran ella tænastuveitingin er so háttað, at prísurin við rímiligheit ikki kann útroknast frammanundan, skal verða upplýst, hvussu prísurin verður roknaður út. Um tað er viðkomandi, ella um hesar upplýsingar við rímiligheit ikki kunnu útroknast frammanundan, skal verða upplýst um allan annan kostnað viðvíkjandi flutningi, levering ella postgjaldi.
*Stk. 3.* Við eina áheitan um keyp skilst eitt handilsligt samskifti, har eyðkenni við vøruni og prísurin eru upplýst á ein hátt, sum er hóskandi í mun til nýtta handilsliga samskiftismiðilin, og sum ger kundan føran fyri at keypa.“

7) Í § 14 verður sum nýtt stk. 4 sett:
„*Stk. 4.* Stk. 1-3 verða nýtt samsvarandi, um vørur verða bodnar út elektroniskt til brúkarar við møguleika fyri bílegging.“

8) Í § 28, stk. 3, verður eftir „§§ 9- 11“ sett: „§ 12 a“.

### § 2

Henda løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 151/2010

# Løgtingslóg um ítróttavedding

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunngerð løgmaður hesa løgtingslóg:

## Kapittul 1
## Um Sp/f Ítróttavedding

**§ 1.** Sp/f Ítróttavedding er felag hjá landsstýrinum, Ítróttasambandi Føroya og Føroya Ungdómsráð.
*Stk. 2.* Landsstýrið eigur 20% av samlaða innskotspeninginum, Ítróttasambandi Føroya 50% og Føroya Ungdómsráð 30%.

**§ 2.** Smápartafelagslógin er galdandi fyri smápartafelagið í øllum viðurskiftum felagsins.
*Stk. 2.* Felagið skal verða stjórnað av eini 5- ella 7-mannanevnd, ið skipar seg sjálv.
*Stk. 3.* Samtykt felagsins ella broyting í samtykt felagsins skal verða góðkend av landsstýrinum, áðrenn hon fær gildi.
*Stk. 4.* Samsýningar til nevndarlimir og lønir til stjóra og starvsfólk skulu góðkennast av landsstýrinum.
*Stk. 5.* Avlop felagsins skal býtast sbrt. § 8.
*Stk. 6.* Landsstýrið hevur til eina og hvørja tíð heimild til at krevja allar upplýsingar og øll skjøl frá Sp/f Ítróttavedding.

## Kapittul 2
## Loyvi at skipa fyri spølum

**§ 3.** Landsstýrismanninum verður heimilað at geva Sp/f Ítróttavedding loyvi til at skipa fyri spølum, so sum veddingar, talspøl og netspøl.
*Stk. 2.* Loyvið verður veitt undir hesum treytum:
1) Av peninginum, sum spælt verður fyri, skulu 50% nýtast sum vinningur til vinnarar.
2) Loyvið skal í minsta lagi endurnýggjast hvørt 5. ár, roknað frá loyvisdegnum.
3) Í loyvinum skal neyvt verða tilskilað, hvørji spøl loyvi verður veitt til.

*Stk. 3.* Landsstýrismanninum er harumframt heimilað at seta aðrar treytir fyri loyvinum.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli frá Sp/f Ítróttavedding áseta nærri treytir fyri tey í stk. 2, nr. 3 nevndu spøl.

## Kapittul 3
## Avtalur við veddingarfeløg

**§ 4.** Sp/f Ítróttavedding kann gera avtalu við veddingarfelag, ið er góðkent av tí danska spælimyndugleikanum, um, at spøl hjá hesum felagnum verða boðin út í Føroyum undir hesum treytum:
1) Landsstýrismaðurin skal góðkenna avtaluna.
2) Veddingarfelagið skal lúka somu treytir í Føroyum sum í Danmark.
3) Avtalan kann í mesta lagi verða gjørd fyri eitt 5 ára tíðarskeið í senn, men ongantíð longur enn tað tíðarskeið, loyvið hjá Sp/f Ítróttavedding er galdandi sbrt. § 3, stk. 2, nr. 2.

*Stk. 2.* Sp/f Ítróttavedding kann eisini gera avtalu við veddingarfelag, ið er góðkent í einum av hinum Norðurlondunum undir somu treytum sum í stk. 1. Tað er tá eitt krav, at veddingarfelagið skal lúka somu treytir í Føroyum, sum í landinum, tað er góðkent í.
*Stk. 3.* Tá Sp/f Ítróttavedding ger avtalu við eitt veddingarfelag, eru treytirnar í § 3, stk. 2, nr. 1 ikki galdandi. Fyri spælið eru tá tær reglur galdandi, sum eru ásettar í tí landi, har veddingarfelagið er góðkent.

## Kapittul 4
## Gjøld

*Góðkenningargjald*

**§ 5.** Landsstýrismaðurin kann við kunngerð áseta reglur um gjald í sambandi við góðkenning av avtalum, ið Sp/f Ítróttavedding hevur gjørt sbrt. § 4.

*Avgjald av vinningum*

**§ 6.** Av vinningum av spølum, ið Sp/f Ítróttavedding bjóðar út, verður goldið eitt avgjald upp á 15% av tí partinum av vinninginum, sum fer upp um 200 kr.

## Kapittul 5
## Afturbering

**§ 7.** Ásett gjøld sambært § 6 fella til Sp/f Ítróttavedding.

## Kapittul 6
## Um avlop felagsins

**§ 8.** Árliga avlopið hjá Sp/f Ítróttavedding verður innan 6 mánaðir eftir roknskaparárslok býtt soleiðis til hesi feløg og stovnar at nýta til almannagagnlig endamál:
1) 60% til ítróttaendamál hjá ÍSF,
2) 20% til barna- og ungdómsendamál hjá F.U.R,
3) 15% til Mentamálaráðið at stuðla ymiskum barna- og ungdómsarbeiði og
4) 5% til Meginfelag teirra Brekaðu at býta út til tiltøk til frama fyri brekað.

*Stk. 2.* Tað, ið útbýtt verður sambært stk. 1, kann Sp/f Ítróttavedding draga frá í skattskyldugu inntøkuni.

**§ 9.** Landsgrannskoðanin hevur eftirlit við, at tann í §

8 nevnda upphæddin verður brúkt til almannagagnlig endamál. Landsgrannskoðanin hevur beinleiðis heimild til at fáa hendur á øllum skjølum frá stovnum/ feløgum ella frá landsstýrismanninum til at útinna hetta eftirlit.
*Stk. 2.* Skjøl sambært stk. 1 fevna um ársroknskapir, roknskapir fyri styttri tíðarskeið, roknskapartilfar, herundir bókhaldstilfar og skjøl, gerðabøkur hjá leiðsluni, grannskoðanarprotokollir, aðrar grannskoðanarfrágreiðingar o.tíl., umframt annað tilfar og upplýsingar, sum Landsgrannskoðanin heldur hava týdning fyri at útinna virki sítt.
*Stk. 3.* Um so er, at Landsgrannskoðanin vísir á, at peningurin ikki er nýttur til tey í § 8 ásettu endamálini, hevur landsstýrismaðurin heimild til við kunngerð at áseta, at tann peningur, sum ÍSF, F.U.R. og Meginfelag teirra Brekaðu skulu býta út í framtíðini, og til viðurskiftini eru fingin í rættlag, í staðin verður býttur út av landsstýrismanninum.

## Kapittul 7
## Eftirlit við Sp/f Ítróttavedding v.m.

**§ 10.** Landsstýrið skipar fyri neyðugum eftirliti við virkseminum og roknskapinum hjá Sp/f Ítróttavedding.
*Stk. 2.* Eftirlitsmyndugleikin kann krevja tær upplýsingar, ið neyðugar eru til tess at kunna útinna eftirlitið.

**§ 11.** Landsstýrismaðurin verður heimilaður at gera neyvari reglur um roknskap og grannskoðan av teimum feløgum, sum fáa stuðul sambært hesi lóg.

**§ 12.** Um eftirlitsmyndugleikin kemur fram á, at brot er framt á ásetingarnar í hesi lóg ella reglur ella treytir, settar sambært lógini, kann eftirlitsmyndugleikin áleggja nevndini, stjóra ella grannskoðara at fáa viðurskiftini í samsvar við galdandi reglur og treytir.
*Stk. 2.* Um so er, at álvarslig brot ella brot upp í saman verða gjørd á hesa løgtingslóg ella kunngerðir, heimilaðar í hesari lóg, ella treytir, givnar sambært lógini, kann loyvi sbrt. § 3 takast aftur av landsstýrinum.

## Kapittul 8
## Revsing v.m.

**§ 13.** Tann, ið fyriskipar óheimilað spøl, sum fevnd eru av hesi lóg, og tann, ið sum millummaður við løn fyriskipar luttøku í útlendskum spølum, sum ikki hevur heimild í § 4, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir.
*Stk. 2.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 3.* Tann, ið tekur lut í ólógligum ella ólógliga fyriskipaðum spølum eftir stk. 1, verður sektaður við bót.

## Kapittul 9
## Gildiskoma

**§ 14**. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær lógin kemur í gildi.
*Stk. 2.* Samstundis sum lógin fær gildi, fer løgtingslóg nr. 34 frá 23. apríl 1999 um ítróttavedding v.m. úr gildi.

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 86/2010

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 4, stk. 3 verður „verða settar yrkisnevndir, ið skulu“ broytt til: „verður sett yrkisnevnd, ið skal“.

2) Í § 5, stk. 4, § 8, stk. 3, § 14, stk. 1, § 16, stk. 1 og stk. 2 og § 18, stk. 1, 1. punktum verður „viðkomandi yrkisnevnd“ broytt til: „yrkisnevndini“.

3) Í § 8, stk. 2 og § 9, stk. 2 verður „Viðkomandi yrkisnevnd“ broytt til: „Yrkisnevndin“.

4) § 10, stk. 3 verður strikað og stk. 4 verður hereftir stk. 3.

5) Í § 17, stk. 2, 2. punktum verða „viðkomandi yrkisnevndum“ broytt til: „yrkisnevndini“.

6) Í § 18, stk. 1, 2. punktum verður „yrkisnevndunum“ broytt til: „yrkisnevndini“.

7) § 20, stk. 5 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Eitt umboð fyri hvønn góðkendan yrkisskúla, yrkisnevndarskrivarin og eitt umboð fyri Mentamálaráðið kann møta á ráðsfundum. Hesi umboð hava talurætt. Men ikki atkvøðurætt.“

8) Í § 21, stk. 2, nr. 2) verður „yrkisnevndir“ broytt til: „yrkisnevnd“.

9) Í § 21, stk. 2, nr. 3) verður „yrkisnevndum“ broytt til: „yrkisnevndini“.

10) Í § 21, stk. 2, nr. 4) verður „smb. § 22, stk. 3“ strikað.

11) Í § 21, stk. 3 verður „yrkisnevndirnar“ broytt til: „yrkisnevndin“.

12) § 22 verður orðað soleiðis:
„**§ 22.** Yrkisútbúgvingarráðið tilnevnir yrkisnevnd, sum skal viðgera mál innan viðkomandi útbúgvingar við støði í teimum heimildum, sum givnar eru í hesi lóg.
*Stk. 2.* Yrkisnevndin hevur 4 limir, tilnevndir av Yrkisútbúgvingarráðnum. Arbeiðsgevarar og løntakarar skulu hava javnstóra umboðan.
*Stk. 3.* Arbeiðsgevarafeløgini: Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF) gera í felag uppskot til 2 limir í yrkisnevndina, umboðandi arbeiðsgevarar.
*Stk. 4.* Løntakarafeløgini: Føroya Handverkarafelag, Landsfelag Handverkaranna, Starvsmannafelagið, S&K felagið, Føroya Prentarafelag, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag gera í felag uppskot til 2 limir í yrkisnevndina umboðandi løntakarar.
*Stk. 5.* Kunnu feløgini ikki koma við uppskoti til limir í yrkisnevndina, skal Yrkisútbúgvingarráðið síggja til, at yrkisnevndin verður sett.
*Stk. 6.* Yrkisnevndin skal gera viðtøkur fyri nevndararbeiðið. Viðtøkurnar skulu greitt lýsa mannagongdina fyri nevndararbeiðinum, hvussu atkvøtt verður um mál, um tilnevning av serkønum, og nær hesi verða innkallað.
*Stk. 7.* Yrkisútbúgvingarráðið skal góðkenna viðtøkurnar fyri yrkisnevndina.
*Stk. 8.* Yrkisnevndin skal eftir tørvi innkalla serkøna hjálp til at møta á fundum.
*Stk. 9.* Lærupláss rinda eitt umsitingargjald til landskassan fyri hvønn góðkendan lærusáttmála til at fíggja útreiðslurnar hjá yrkisnevndarfyrisitingini og til fundarpening og ferðaútreiðslur hjá yrkisnevndini og fyribilsnevndum hjá yrkisnevndini.
*Stk. 10.* Landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá Yrkisútbúgvingarráðnum gjøllari reglur um upphæddina av umsitingargjaldinum og um, hvussu gjaldið verður kravt og umsitið.

13) Í § 23, stk. 1 verður „samtykkja yrkisnevndirnar“ broytt til: „samtykkir yrkisnevndin“.

14) Í § 23, stk. 1 nr. 2), 3) og 4) verður „stk. 4“ broytt til: „stk. 2“.

15) Í § 23, stk. 2 verður „Yrkisnevndirnar hava“ broytt til: „Yrkisnevndin hevur“.

16) Í § 23, stk. 3 verður „Yrkisnevndirnar skulu“ broytt til: „Yrkisnevndin skal“.

17) § 23, stk. 4 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 4.* Yrkisnevndin kann av sínum eintingum

umrøða og bera fram alt, ið hon heldur hava týdning fyri yrkisútbúgvingarnar eftir hesi lóg."

18) Í § 23, stk. 5 verður „yrkisnevnd" broytt til: „yrkisnevndini".

19) Í § 24, stk. 1 verður „Yrkisnevndirnar samtykkja" broytt til: „Yrkisnevndin samtykkir".

20) Í § 24, stk. 4 verður „Yrkisnevndirnar" broytt til: „Yrkisnevndin".

21) Í § 24, stk. 2 verður „yrkisnevnd" broytt til: „yrkisnevndin".

22) Í § 25, stk. 1 verður „Yrkisnevndirnar virka" broytt til: „Yrkisnevndin virkar".

23) Í § 25, stk. 2 verður „Viðkomandi yrkisnevndir kunnu" broytt til: „Yrkisnevndin kann".

24) Í § 35, stk. 2, § 36, stk. 2 og stk. 3 og § 37 verður „viðkomandi yrkisnevnd" broytt til: „yrkisnevndin".

25) Í § 40, stk. 1 verður „viðkomandi yrkisnevnd" broytt til: „yrkisnevndina".

**§ 2**

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Yrkisnevndirnar, sum tilnevndar vóru 1. august 2009, verða sitandi, til nýggj yrkisnevnd sbrt. § 22, stk. 1 er tilnevnd.

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 119/2010

# Eykajáttanarløgtingslóg fyri mars 2011

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

# Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir Eykajáttan v/løgtingslóg** | | | **2011** |
|---|---|---|---|
| | Rakstrarætlan | | Løgu- |
| Túsund kr. | Útreiðslur | Inntøkur | ætlan |
| **§ 2. Løgmansfyrisitingin** | **750** | **-** | **-** |
| 11. Felagsútreiðslur | 750 | - | - |
| **Tilsamans** | **750** | **-** | **-** |
| Yvirskot | - | -750 | - |
| | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
| Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ | **-** | **-750** | **-** |

# Tekstur

## *§ 2 Løgmansfyrisitingin*

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 750 | 750 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **750** | **-** |
| 2.11.1. Fyrisiting | | 750 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **2.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 02. Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | J | 7.397 | - |
| | **EYJ** | **750** | **-** |

Tórshavn, 17. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 137/2010

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705